# Føroyingar ynskja designvørur

Í miðbýnum í Havn lat herfyri ein nýggjur búnýtishandil upp, nevndur Heimdesign. Eigarin, Tróndur Skaalum, er 25 ára gamal og varð útlærdur sum sølumaður fyri einum ári síðani. Men hann vildi ikki arbeiða sum vanligur sølumaður fyri onkran annan og valdi tí at royna sjálvur.

– Eg helt, at tað manglaði ein búnýtishandil, ið seldi designvøru. Føroyingar hava higartil ikki gingið serliga høgt uppí design innanfyri køksamboð, og servican hjá teimum flestu er ofta okkurt, tey hava arvað. Men tað er nú um at broytast. Serliga tey ungu vilja hava kvalitet, sum sær gott út samstundis, og tað er tað, sum eg selji, sigur Tróndur.

## Design vørur

Hann leggur dent á, at hann ikki selur merki, sum aðrir handlar í býnum selja, tvørturímóti er hann einaumboð í Føroyum fyri fleiri av merkjunum.

Í Heimdesign fært tú køksamboð, so sum knívar, grýtur og ellutir, tú fært vínartiklar, stell, gløs og mangt annað.

– Tá eg fái mína næstu sending í november mánaði, vænti eg, at sortimentið verður fult. Tá fari eg millum annað at kunna bjóða merki sum vælumtókta Royal Copenhagen, Aida við designaranum Mads Odgaard, Søholm porcelæn, Spiegleu, Stelton og vøru við kenda designaranum Erik Bager, sum fyrr arbeiddi hjá Royal Copenhagen, men nú er farin fyri seg sjálvan. Hetta eru alt dygdarvørur, sum tó hava ein sámuligan prís, greiðir Tróndur Skaalum frá.

Eisini innan bestikk og knívar hevur merkið nakað at siga. Tróndur sigur, at onkur merki eru serliga kend fyri sín góða kvalitet og at hann selur nøkur teirra.

– Eg havi teir vælumtóktu Raadvad knívarnar og eg selji eisini kenda merki Fiskars. Men tað eru fleiri, sum vegna gikt og annað ikki fáa nýtt vanligu køksútgerðina. Tí havi eg eisini ergonomiska køksútgerð av merkinum Brix. T.d. havi eg hjálpitól til at lata krukkur o.a. upp við, sigur Tróndur.



*Móti er eisini innan servisu. Her vísur Tróndur eitt stell, inspirerað av Asia. Krúss uttan hondtøk er nýggjasti mótin sigur Tróndur*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

## Mótin innan køksútgerð

Tróndur Skaalum sigur, at tað avgjørt er móti í køkstingum. Men hann skiftir ikki so ofta, sum t.d. klædnamótin ger.

– Stálið hevur verið á móta nú í nøkur ár og træ er eisini altíð vælumtókt. Í løtuni er porcelænið inspirerað av asia, við avlongum tallerkum og krússum við ongum handtøkum. Men nøkur ting eru sjálvandi altíð á móta, og eitt hvítt stell kanst tú altíð nýta, sigur Tróndur.

Víðari sigur hann, at hann altíð kann útvega vøru, sum hann ikki hevur í handlinum, um kundin ynskir tað.

– Mítt mál er, at um kundin ynskir okkurt ávíst, so kann eg altíð skaffa tað. Fyrst leiti eg sjálvandi í katalogunum við merkjum, sum eg longu umboði, men hava teir tað ikki, kann eg altíð seta meg í samband við onkran, sum hevur ynsktu vøruna, greiðir hann frá.

– Serliga tey ungu, sum nú byggja sær hús, ynskja at hava alt vakurt og gjøgnumført í køkinum, samstundis sum kvaliteturin er í hásæti. Um tey t.d. velja sær hvítvørur av rustfríum stáli, so kunnu vit bjóða at útvega grýtur, knívar og aðra køksútgerð av sama tilfari, soleiðis, at alt hóskar saman. Tað er ein tænasta, vit bjóða, sigur Tróndur. Hann endar við at siga, at fólk eru vælkomin at seta seg í samband við hann. – Saman skulu vit nokk finna røttu loysnina, heldur hann.




ÚTSØLAN BYRJAR FRÍGGJADAGIN
27. AUGUST KL. 9.00
Kallkyn
VÁGSBOTNUR • TEL. 316 206



LANGUR LEYGARDAGUR
í miðbýnum · 28. august 2004 · opið er til kl. 17.00 · VIT SÍGGJAST










